## DAGSINS MEINING

## Hálvur sigur

Grønlendingar hava partvíst vunnið ein sigur í málinum at byggja út radarstøðina í Thule. Amerikanski uttanríkisráðharrin gav ikki Grønlandi og Danmark váttan um, at USA vil samráðast av nýggjum um verjuavtaluna frá 1951. Men Collin Powell segði eftir fundin við landsstýrismannin í uttanríkismálum, Josef Motzfeldt, og danska uttanríkisráðharran, Per Stig Møller, at USA er sinnað at gera ískoytisavtalu. Harafturat segði hann seg skilja ynski grønlendinga.

Tað er eitt stórt framstig. Men tað er ein sigur, at danska stjórnin nú tykist taka krav grønlendinga um, at støðin verður ikki útbygd, fyrrenn verjuavtalan er endurskoðað, og at grønlendska heimastýrið er við í samráðingunum, í álvara. Fyrst í november var orðaskifti um málið í Fólkatinginum. Tá vildi stjórnin ikki geva grønlendsku fólkatingslimunum lyfti um, at danska stjórnin fór at krevja, at verjuavtalan verður endurskoðað. Heldur ikki vóru donsku flokkarnir at vika, tá grønlendsku og donsku uttanríkis- verjupolitisku nevndirnar hittust seinri í novemeber.

Nú, eftir valið, tykist stjórnin hava broytt hugsan, ella partvíst. Tað er kanska ikki so løgið, tí hon ber óivað ótta fyri einum samanbresti við grønlendingar. Grønlendingar hava sagt, at góðtaka danir ikki kravið verður “opin konfrontatión”. Fyri Danmark hevur støðin í Thule og góð viðurskifti við grønlendingar stóran týdning. Tí, í NATO og verjupolitiskum høpi er Grønland, eins og Føroyar, týðandi liðir. Vit vita, at tá NATO skuldi leggja út kjarnorkuvápn í 50-árunum, slapp Danmark undan at slíkari goymslu. Støðin í Thule vigaði upp ímóti. Og í 1957 gav forsætisráðharrin USA loyvi at hava kjarnorkuvápn við Thulestøðina.

Verandi avtalu gjørdu USA og Danmark, meðan Grønland var hjáland. Úr frá einum fólkaræðiligum sjónamiði er tað ídag ein sjálvfylgja, at Grønland sum ein sjálvstøðugur partur í danska ríkinum kann siga sína hugsan og at ávirka avgerðir við atliti til støðina. Men ivasamt er, um USA og Danmark góðtaka grønlendska kravið, at tað eru grønlendingar, sum gera eina avtalu og áseta innihaldið í henni. Afturímóti er hugsandi, at Grønland kann fáa okkurt burtur úr ískoyisavtalu – arbeiði, endurgjald, umhvørvisatlit o.s.fr. – og harafturat sleppa teir at sita við borðið.

Higartil hava Danmark og USA vilja gjørt ískoytisavtalu, m.a. um umhvørvi. Men nú skilur amerikanski uttanríkisráðharrin grønlendingar. Søgan sigur okkum, at vanliga leggur USA sektin á smálond. Tí er ikki løgið, at Josef Motzfeldt er nøgdur eftir fundin við Collin Powell, hóast tað kanska ikki verður nýggj verjuavtala, men ískoyti til hana.

Á hesum stað er áður gitt, at danir fara at toyggja seg langt fyri at ganga grønlendskum ynskjum á møti í hesum og í sjálvstýrismálinum, tí Grønland hevur stóran týdning í NATO høpi og í amerikanska trygdarpolitikki. Danmark skal lata og Danmark skal hava. Í verandi støðu sita grønlendingar við einum trumfi. So er spurningurin, um ella hvussu stórt trýst Danmark kann leggja á USA. Josef Motzfeldt tykist góðtaka eina ískoytisavtalu, um ávís ynski verða gingin á møti. So er hin spurningurin, um landsstýrisformaðurin, Hans Enoksen, heldur fast um endursamráðingar, ella góðtekur ískoytisavtalur, sum neyvan skerja víttganagdi heimildirnar hjá USA sambært verandi avtalu. Men í øllum hevur Grønland gjørt stór framstig.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Onkur bankar á dyrnar, latið upp!!

**Eli Hentze**
*kommunustýrislimur á Sandi*



Framtíðin er í túninum. Skulu vit lata upp, tá ið bankað verður á dyrnar, ella skulu vit stongja hurðina?

Rúni Hentze, løgtingsmaður fyri Sandoynna, er ikki í iva. Vit eiga at lata dyrnar upp! Men ikki hvør í sínum lagi. Vit í Sandoynni skulu lata tær stóru felagsdyrnar á víðan vegg og bjóða framtíðini inn í tann stóra salin. Júst tann stóra salin, tí hann er best egnaður at hýsa framtíðini.

Rúni ynskir vágamonnum um tillukku við framtíðini, undirsjóvartunnilin er veruleiki. Í somu grein heitir løgtingsmaðurin á Sandoynna um at standa saman sum ein oyggj, tá ið stórmál skulu loysast - t.d. ein undirsjóvartunnil í Sandoynna, ein ítróttarhøll o.s.fr. Eg taki av fullum huga og hjarta undir við Rúna. Sandoyingar eiga í morgin sum ein annan dag at opna dyrnar og gera klárt til at taka ímóti framtíðini.

Men orð, føgur orð aleina, flyta ongi fjøll. Framtíðin er í túninum, men tað eru vit, og bert vit, sandoyingar, ið gera av, um eisini vit vilja loyva henni framat.

Kommunusamanlegging er ein møguleiki. Sandoyggin sum ein kommuna! Hetta er hvørki nýhugsan ella nøkur gandaorð, men ein møguleiki, ið sandoyingar als ikki eiga at avskriva. Vit eiga í morgin sum ein annan dag at taka stig til at finna fram til møguleikar og vansar við eini kommunusamanlegging í Sandoynni og tá taka støðu. Nógvir spurningar skulu svarast, nógv ivamál eru! Men at avskriva tankan, áðrenn spurningurin er svaraður til fulnar, er tað sama sum at klamsa hurðina í skortin á gestinum í túninum, framtíðini. Bygdarráðsformenninir í oynni hava av og á formansfund. Átti hesin spurningurin ikki at verið reistur á hesum fundi?

Sandoyggin sum ein kommuna er ikki einsamalli lykilin til framtíðina. Eindin er enn ov lítil! Landið fer framhaldandi at hava hin lykilin í varðveitslu. Munurin verður tann, at okkara samanhald stendur munandi sterkari á Føroyakortinum. Vit kunna spegla okkum í fótbóltsfelagnum, sum fyri fáum árum síðani stóð ovast á sigurspallinum, hevði vunnið á øllum øðrum í Føroyum! Umboðaði Sandoynna eins væl og allar Føroyar í evropeiskum fótbólti. Tað samanhald og tann styrki, ið vísti vegin, eigur at verða politiska fyrimyndin hjá øllum sandoyingum, nýggjársynski fyri Sandoynna!

Í hesum fullveldistíðum er helst hóskandi at enda við danska orðatakinum: mange bække små gør en stor å!!

Jóla og nýggjársgesturin í túninum bankar á dyrnar. Latið upp!!

Við ynskjum um eini Gleðilig Jól og Gott Nýggjár fyri øll!!

# Tá alternativið er samband

**Helgi Abrahamsen**



Mánakvøldið 16. desember hevði Sjónvarp Føroya samrøðu við Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmann, sum er partur av meirilutanum í fíggjarnevndini. Í samrøðuni spurdi sjónvarpsmaðurin millum annað, um Tórbjørn kundi lova, at hann ikki fór at atkvøða fyri nakrari eykajáttanarlóg í komandi ári. Tórbjørn svaraði soleiðis: ”Eg fari at atkvøða fyri eykajáttanarlógum um so er, at tær eru útreiðsluneutralar”. Sjónvarpsmaðurin spurdi síðani, um hetta merkti, at hann ikki fór at atkvøða fyri eykajáttanarlógum sum vóru ein beinleiðis útreiðsla hjá landskassanum, og Tórbjørn svaraði: ”Nei tað vænti eg ikki”.

Hetta er sera áhugavert, og ikki minni løgi.

Í tveir heilar mánaðar hevur meirilutin í fíggjarnevndini sitið og leitað eftir sparingum, sum millum annað skuldu fíggja ein skattalætta á 50 mió. krónur. Meirilutin fann sparingar fyri góðar 90 mió. krónur, men sjálvur skattalættin kom ikki við í broytingaruppskotið hjá meirilutanum. Hann skal koma seinni sum eykajáttanarlóg. Men um eykajáttanarlógin ikki skal kosta lands-kassanum nakað, so má fíggjarnevndin tá aftur seta seg niður at finna nýggjar sparingar fyri 50 mió. krónur, tí annars verður hetta ein útreiðsla fyri landskassan, og tað kann Tórbjørn Jacobsen ikki atkvøða fyri (um hann heldur orð).

Spennandi verður at síggja, hvar fíggjarnevndin tá finnur aðrar 50 mió. krónur í sparingum, ella um lovaði skattalættin ongantíð kemur. Triði møguleikin er, at vit kortini fáa eina eykajáttanarlóg, sum minkar um avlopið hjá landskassanum, og satt at siga, so rokni eg við, at tað verður júst tað, sum fer at henda, tí annars slitnar sjálvsstýrissamgongan, og - sum maðurin segði: ”alternativið til verandi samgongu er svart samband”. - Tá vilja teir heldur ofra landskassan, fyri at halda fast við maktina.

Livst so spyrst!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Eyga fyri eyga ella Ger móti øðrum, sum tú vilt onnur skulu gera móti tær?

VIÐMERKING
*Annika Sølvará, forkvinna Amnesy International Føroya Deild*



Sjálvan mannarættindadagin, 10. desember, vóru Jerry McCracken og Desmond Carter tiknir av døgum við eiturinnsprænging. Hetta vísir týðuliga, hvørja støðu USA hevur til mannarættindi og frælsi. Sama land, sum krevur, at onnur skulu halda mannarættindini, er sjálvt eitt av størstu syndarunum, tá talan er um at virða tað mest grundleggjandi rættindi: rættin til lív. Bara hesar fyrstu dagarnar í jólamánaðinum hevur USA avrættað 7 fólk og ætlanir um aðrar 4 avrættingar fyri jól.

Hetta hendir, samstundis sum meira enn helvtin av londunum í heiminum hava valt ikki at nøta deyðarevsing longur. Tey hava staðfest, at deyðarevsing ikki kann sameinast við virðingini fyri mannarættindum, at hon heldur ikki virkar avskrekkjandi og at tað er ein eyðsøndur vandi fyri, at ósek fólk verða tikin av døgum.

USA krevur at sleppa at seta altjóða politisku dagskránna, tá talan er um at verja mannarættindini, eitt nú í sambandi við Irak og Kina. Sama landið hevur síðani 1977, tá deyðarevsingin varð tikin uppaftur, avrættað 817 fólk. Bara í ár eru higartil 68 fólk tikin av døgum: 1 í elektriska stólinum, 67 við eiturinnsprænging.

Á deyðsgongini í Louisiana situr Ryan Matthews á sætta ári. Hann er dømdur fyri morð, framt tá hann var 17 ár. Hann er sambært amerikanskari lóg ov ungur til at verða við í einum nevningatingi, eins og tað, sum dømdi hann til deyðis. Hann er eisni ov ungur til at sleppa at síggja eina avrætting framda. Men hann er ikki mettur at vera ov ungur til sjálvur at verða dømdur og avrættaður, meðan fólk sita og hyggja at. USA stendur fyri tveimum triðingum av øllum avrættingum av ungdómsbrotsmonnum seinastu 10 árini. Í 2002 eru 3 ungdómsbrotsmenn tiknir av døgum í USA.

Síðani 1990 hava 191 lond ratifiserað Barnarættindakonventiónina, sum er ein av konventiónunum, sum forbjóðar deyðarevsing fyri brotsverk framd, áðrenn brotsmaðurin fylti 18 ár. Bara Somalia og USA hava ikki skrivað undir.

Í ein røðu á ST-aðalfundinum herfyri um Irak tosaði Bush forseti um "brotnar avtalur", um ST samtyktir sum verða "einvíst undirgrivnar" og um ynskið hjá USA, at ST-felagsskapurin skal vera "effektivur, virdur og úrslitagóður". Amnesty International hevur í frágreiðing um deyðarevsing í USA víst á, at avrættingin av ungdómsbrotsmonnum er líka álvarsligt brot á avtalur, virðingin fyri samtyktum er líka lítil og virðingin fyri ST og altjóða rætti undirgrivin á sama hátt.

Síðani 1973 hava fleiri enn 100 deyðadømdir fangar fingið dómin umstoyttan og eru leyslatnir, tí nøggj prógv hava víst, at teir ikki vóru sekir í teimum ákærum, teir vóru dømdir fyri. Fleiri hava sitið á deyðsgongdum í áravís og einans verið dagar frá at verða avrættaðir. Hvussu nógv ósek ikki náddu at fáa dómin umstoyttan, ber ikki til at siga.

Forsetin í Russlandi, Vladimir Putin, er leiðari í einum landi, sum fremur nógv og álvarslig brot á mannarættindini. Hann segði í juli 2001, at: "Staturin eigur ikki at taka sær tann rættin, sum bara hin Alvaldi hevur ...at taka eitt mannalív. Tað er tí, eg við vissu kann siga, at eg eri ímóti, at Russland innførir deyðarevsing aftur."

"Vit virða hvørt mannalív", segði Bush forseti í røðu sínari til tjóðina 11. september 2002. Um so er, átti hann í stundini at syrgt fyri at leitt USA inn í røðina av londum, sum venda deyðarevsing bakið.

### Fakta

Í ársfrágreiðingini hjá Amnesty International fyri 2001 er gjørt upp, at í minsta lagi 3.048 fólk vóru avrættaði í 31 ymsum londum. 5.265 vóru dømd til deyðis í 68 londum. Kina avrættaði nógv flest fólk, í minsta lagi 2.468, helst nógv fleiri. Síðani koma Iran, Saudi Arabia og so USA á fjórða plássi

74 lond hava avskaffað deyðarevsing sum heild. Í 15 londum kann deyðarevsing bara verða brúkt í sambandi við krígsbrotsverk. Onnur 22 lond hava í verki ikki avrættað nakran seinastu 10 árini ella meira.

Áhugað kunnu lesa meira á http://www.deathpenaltyinfo.org/ og http://www.amnestyusa.org/abolish/index.html

Kort yvir USA, har víst verður, hvar og hvussu nógvar avrættingar hava verið framdar síðani 1977: http://www.deathpenaltyinfo.org/executionmap.html

## PRESSNOTISER FRÅN AMNESTY

Måndag 16 december 2002

USA
Utomrättsliga avrättningar är aldrig försvarbara
Uppgifterna om att Bush-administrationen har upprättat en "dödslista" över klassade "terrorister" och gett CIA befogenheter att döda dessa personer är enligt Amnesty extremt oroväckande. Att världens enda stormakt nu ger klartecken åt sina tjänstemän att avrätta män och kvinnor som misstänkts för "terroraktiviteter", utan en rättslig process, uppbackade med hemliga bevis, är oacceptabelt. Rätten till en korrekt rättegång är en grundläggande mänsklig rättighet och är en förutsättning för ett demokratiskt fungerande samhälle. Misstänkta förövare ska ställas inför rätta, ha tillgång till advokat och kunna bemöta bevis mot honom eller henne. Genom att tillåta utomrättsliga avrättningar frångår USA denna princip och urholkar därmed rättsstaten. Det ger dessutom signaler till andra länder, som exempelvis Israel, att det är tillåtet och försvarbart att avrätta misstänkta personer utan rättegång.

Amnesty motsätter sig dödsstraffet under alla förhållanden och anser att straffet kränker den mest grundläggande rättigheten - rätten till liv.

USA
Amnesty skriver till presidenten om fångarna på Kuba Amnestys internationella generalsekreterare Irene Khan har ännu en gång framfört Amnestys kritik gällande behandlingen av fångarna på Guantanamo Bay till president Bush. Nu har snart ett år gått sedan de första fångarna anlände och de har varit i ett rättsligt vakuum sedan dess. Amnesty kräver att fångarna friges och får tillåtelse att återvända till sina hemländer, såvida de inte misstänks för brott eller riskerar människorättskränkningar vid ett återsändande. Om de misstänks för brott ska de ställas inför rätta och få en korrekt rättegång i enlighet med internationella normer. Enligt Amnesty lever inte militärdomstolen som USA har upprättat för fångarna upp till dessa normer. I brevet upprepade Irene Khan sin förfrågan från i april i årom att Amnesty ska få tillgång till lägret.Presidenten fick dessutom åter ta del av det memorandum som skickades till honom i våras som tar upp all den kritik och de farhågor som Amnesty harangående behandlingen av fångarna.

**Annika Flensburg**
pressekreterare
Amnesty International, svenska sektionen

# Jólakonsert í Havnar Kirkju



*Kristiliga Sangkóri fer at syngja jólaløg í Havnar Kirkju sunnudagin kl 16*

JÓLAKONSERT
*Eirikur Lindenskov*

Sunnudagin kl 16 verður árliga jólakonsertin hjá Kristiliga Sangkórinum.

Kóri fer at framføra kend jólaløg, og Sverri Steinhólm, prestur, fer at siga nøkur hugnalig jólaorð.

Tað er Hanus Joensen, sum er kórleiðari hjá Kristiliga Sangkórinum, ið til hvørji jól setir sín serliga dám á jólahøgtíðina við jólasangi.